# Kristjan fyri triðju ferð

**Á triðja sinni er stóri skiparin Kristjan á Neystabø komin inn sum formaður í B36. Uppgávan var, enn einaferð, at fáa skútuna á rættkjøl og seta nýggja kós. – Málið er ikki meistaraheitið. Vit bróta upp av nýggjum, so tað kann blíva eitt sterkt og robust felag, sigur formaðurin**

## Metingin

**B36 er í nógvar mátar stóra óvissan í Vodafone-deildini. Havnarfelagið hevur seinni árini verið ein støðugur partur av føroyska fótbóltsoddinum, og í fjør gekk heilt væl, hóast sagt varð farvæl við fleiri profilar. Tað er gjørt aftur í ár, og takið hjá nýggja venjaraparinum verður at tippa holini, sum standast av hesum.**



Endaveggurin í B36-húsinum er prýddur við mynd av fleiri teirra, sum løgdu lunnar undir felagið. Sjálvur hevur Kristjan bygt á somu lunnar í fjórðingsøld, og hann var til reiðar at taka enn eitt tørn, tá tað heyst brádliga leikaði heilt hart á

Mynd: Álvur Haraldsen

Seinasti fjórðingurin í 2008 gjørdist kanska ein tann daprasti í søguni hjá árstalsfelagnum B36 úr høvuðsstaðnum.

Svárir fíggjarligir trupulleikar komu undan kavi, og stóð felagið nærri eini tvangsniðurflyting í niðastu deildina enn ynskiligt var.

Samstundis sum felagið seinastu trý árini hevur stílað høgt, hevur tað ikki havt ítróttarliga viðgongd, og eru eingir veruligir ítróttaligir sigrar komnir í hús.

Seinasta fólk vistu, so var B36 millum fíggjarligu elituna í føroyskum fótbólti, og mundi tað virka sum hvøllur brestur fyri bróstið hjá trúgvu fjepparunum, tá tann myndin brádliga brotnaði.

### Fyri ideologiina

Hóast illa stóð til, var bjargingin ikki longri burturi enn so.

Kristjan á Neystabø hevur í yvir 20 ár sitið í nevndini og verið formaður í felagnum. Og hóast hann hevði takkað fyri seg, lat hann seg yvirtala til at taka eitt seinasta hál fyri felagið, og er hann aftur í dag formaður í felagnum. Men hví valdi hann at taka við aftur, tá hann longu hevði takkað fyri seg einaferð?

– Eg havi verið rundanum felagið alla tíðina. Eg hevði ongar ambitiónir um at koma í nevndina aftur, men nú bleiv tað soleiðis, og tað bleiv heitt á meg um at taka eitt tørn afturat, og eg segði ja, sigur Kristjan á Neystabø. Hann leggur tó afturat, at tað verður ikki leingi hesaferð.

Tað er eingin loyna at tað stóð illa til í B36, og tungar avgerðir skuldu takast, umframt at bygnaðurin eisini skuldi broytast. Fólkini í felagnum hava ivaleyst vitað, at fáur mundi verða betri egnaður at gera hetta enn júst Kristjan á Neystabø.

FC Tórshavn P/F er nú sett á stovn og skal taka sær av vodafoneliðnum burturav. 20 menn hava sett tilsamans 1 millión krónur í hetta felagið.

– Teir menninir, sum seta tilsamans eina millión í felagið, gera tað av ideologiskum orsøkum, sigur Kristjan á Neystabø. Hann dylur heldur ikki fyri, at júst ideologiin er stórur partur av orsøkini til, at hann tekur eitt tørn afturat.

### Nýggj fíggjarlig og ítróttarlig byrjan

At felagið var komið í óføri, vil Kristjan á Neystabø ikki gera nógv burturúr. Hinvegin slær hann fast, at teir hyggja frameftir og bróta upp av nýggjum.

Fremsta liðið er í einum partafelag fyri seg. Leikararnir á liðinum eru farnir niður í løn og fíggjarviðurskiftini fingin upp á pláss. Samstundis verður ítróttaligi parturin eisini kollveltur.

– Vit fara nú í gongd við eina prosess, har vit vilja rekruttera frá okkum sjálvum. Vit mugu gera okkum meira leysar av leikarum uttanífrá. Vit hava eisini lagt eina nýggja strategi, har vit um trý ella fýra ár hava eitt lið frá okkum sjálvum, sigur Kristjan á Neystabø.

Samstundis avdúkar hann, at málið í ár er ikki meistaraheitið.

– Tað verður ikki gjørt fyri einhvønn prís. Men málið í ár er at fáa felagið aftur á beint og samstundis kunna liggja millum tey fremstu liðini, slær Kristjan á Neystabø fast.

### Kend fólk skulu lyfta felagið

Meðan Kristjan á Neystabø er komin inn at fáa skil á bygnaðarliga og fíggjarliga partin av felagnum, er eitt annað kent andlit eisini komið inn at lyfta ítróttarliga partin av felagnum.

Vit tosa her um Mikkjal Thomassen, sum eftir eitt ár í EB/Streymi er aftur í B36, tó sum venjari hesuferð. Men hví, í einum felag við stórum ambitiónum, velja ein mann við ongum royndum á økinum til venjara?

– Eg havi observerað Mikkjal í nógv ár nú. Vit kenna Mikkjal, teir eginleikar, hann hevur, og hvat hann stendur fyri. Eg havi eina trúgv á, at hann kann verða ein góður venjari, hóast hann ikki hevur pappírini. Tað sama var galdandi við Sigfríði Clementsen á sinni, og eg føli meg tryggan við Mikkjal, staðfestir Kristjan á Neystabø.

Formaðurin í B36 heldur eisini, at Mikkjal er júst tann rætti maðurin til at byggja upp við.

– Vit kenna hvønn annan sera væl, og tað er sera umráðandi í hesi tilgongdini, sum nú fer í gongd, nevniliga har teir ungu skulu fáa sín kjans og spælast inn á liðið. Hann hevur somu sjónarmið sum vit, at standa saman, brynja okkum og byggja okkum upp. Tí er Mikkjal júst tann rætti, leggur Kristjan á Neystabø dent á.

Rógvi Nybo
rogvi@sosialurin.fo

Baldvin Baldvinsson
MÁLARAMEISTARI
Mýrisnípuvegur 18 · 100 Tórshavn
311239 / 211239 / 321239

Vit mála húsini innan og uttan og seta tapet upp - eisini filt og vev



MØGULEIKAR OG LOYSNIR